# VEÐRIÐ Á VIÐAREIÐI



# SEPTEMBUR 2022

# VEÐURSTOVA FØROYA

# Innihald


Viðareiði ........ 3

Veðrið í bygdini ........ 4

Norðan ........ 5

Landnyrðingur norðan ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

Landnyrðingur ........ 6

Landnyrðingur eystan ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

Eystan ........ 6

Landsynningur eystan ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

Landsynningur ........ 7

Landsynningur sunnan ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

Sunnan ........ 8

Útsynningur sunnan ........ 9

Útsynningur ........ 9

Útsynningur vestan ........ 10

Vestan ........ 10

Útnyrðingur vestan ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

Útnyrðingur ........ 11

Útnyrðingur norðan ........ 12

Fólk at tosa við um veðrið eitt kvøldi á Viðareiði ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

Spurningar og svar ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**


**Dagfesting**: 20. september 2022

**Staður**: Eiðsvíksvegur 16 – 750 Viðareiði

**Heimildarfólk:** Joen Jacob (Akki) Heinesen, bóndi og útróðrarmaður – umframt hava Sjúrður Joensen í Innistovu og Nils Jákup Absalonsen í Heimistovu gjøgnumlisið og gjørt viðmerkingar

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

## Viðareiði

Viðareiði er norðasta bygdin í Føroyum – á einum eiði norðast á Viðoynni.

Norðureftir og suðureftir eru høg fjøll, meðan bæði eystan fyri og vestan fyri bygdina er opið hav.

Norðan fyri eiðið og harvið eisini bygdina og í ein útnyrðing norðan er triðhægsta fjallið í Føroyum, Villingardalsfjall (843m). Úr Villingardalsfjalli og í landsynning er ein lægri fjallarøð, sum ímóti eggini. Sunnanfyri er Malinsfjall (750m).




Mynd 1: Kort av Viðoy. Bygdirnar báðar á oynni, fjøllini og onnur staðarnøvn síggjast.

Sjálvt eiðið er opið í útnyrðing vestan og landsynning eystan. Ættin liggur eftir eiðinum ikki bert á hesum báðum ættum, men eisini á ættunum báðumegin við: á vestri og útnyrðingi og á eystri og landsynningi.

Villingardalsfjall og fjallarøðin úr Torratindi og í landsynning ávirka veðrið í bygdini, tá ið ættin er ímillum útnyrðing og landnyrðing norðan. Malinsfjall ávirkar veðrið, tá ið ættin er sunnan og báðumegin sunnan.

Oyggjarnar eystan fyri Viðoy ávirka ikki veðrið í bygdini. Tó síggjast nógv tekn á bæði Fugloy og Svínoy, hvør ættin er í bygdini.

Oyggjarnar vestan fyri Viðoy ávirka veðrið í bygdini eitt sindur. Kunoy og Kalsoy ávirka, tá ið ættin er úr útsynningi upp í vestan. Oman fyri vestan ávirkar eingin onnur oyggj veðrið á Viðareiði.

## Veðrið í bygdini

Veðrið á Viðareiði er sera nær tengt at ættini. Sveiggini ímillum gott og ringt veður kunnu vera stór, og bert lítil munur í ættini kann gera stóran mun í veðrinum. Er liggjandi góðveður av suðri í nakrar dagar, kann vera sera lýtt og gott veður við klárum lofti og nógvari sól. Liggur hann vestaneftir, er vanliga nógvur vindur, á norðurætt kann vera gjøgnumtreingjandi kuldi, og á eystri kann mjørki fjala alla bygdina.

Alt meðan veðrið aðrastaðni í Føroyum kann vera munandi øðrvísi.

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í bygdini, setti undirritaði seg í samband við Joen Jacob Heinesen (**JJH**), vanliga nevndur Akki. **JJH** hevur eitt 4-markafesti á Viðareiði, umframt at hann hevur verið sjómaður alt sítt vaksna lív – t.e. útróðrarmaður og skipari á trolbáti á landleiðini, umframt ein av frægastu bakkamonnunum, tá ið teir hava fleygað lunda í urðini ella í Settorvu.

Við til samrøðuna í heiminum hjá **JJH** hevði eg spurnarblað – til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdin:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Tá ið hann kemur av norði, siga viðingar, at hann stendur inná (*inn á oynna*). Yvirhøvur er minni vindur, enn sagt er fyri landið á norðurætt.

Er barometrið høgt, og tað er lítil vindur, er vanliga stilt og køli/kalt í bygdini. Í góðum veðri um summari er sjáldan turt veður á Viðareiði – tá ið sólin skínur á norði, er ælið víst.

Øðrvísi er, tá ið vindurin er nógvur, 20 m/s ella meiri. Tá er ættin ójøvn í bygdini – ikki bert á beinum norði, men á ættunum báðumegin við, t.e av útnyrðingi norði og landnyrðingi norði.

Beinur norðan er ringur, og á ættunum kring norðan liggur hann rangur – t.e. at tað slær aftur í Malinsfjalli. Landnyrðingur norðan hevur tær harðastu hvirlurnar og er skaðaætt.

Er ættin eystan fyri norðan, skáar hann á Múlanum.

Norðan er vanliga roknað sum ein vát ætt á Viðareiði.

Á Viðareiði gongur toran harðast á norði.

Norðan er ikki roknað sum vanlig mjørkaætt, tó at tað um summarið kann vera liggjandi mjørki, tá ið veðrið kring oyggjarnar er gott. Tá setir hann mjørkan um skørini.

Skadda er vanlig um Villingardalsfjall á norði (*frá útnyrðingi til landnyrðing*).

Yvirhøvur er norðan ein góð ætt, men hon kann ikki brúkast til nógv.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur er ójøvn ætt – sleppur ikki beint eftir eiðinum. Er nógv avfall, er ættin meiri ójøvn.

Liggur hann beint undir landnyrðingi, á landnyrðingi eystri, liggur hann um eiðið, og tá er hann javnur.

Ættin er ikki vanlig á Viðareiði. Tað er ikki meiri vindur enn sagt er fyri landið á landnyrðingi; viðhvørt er minni vindur.

Ættin er vát, og tað kann vera mjørki, serliga á vári.

Landnyrðingur er ikki ein góð ætt í bygdini, men ymiskt er, hvussu fólk ymsastaðni í bygdini uppliva ættina.

Á landnyrðingi er vanliga brim í Eiðsvík og fram við landinum, tó at ættin viðhvørt kann vera góð í Eisvík. Ættin er sett í samband við kulda og er tann ringasta at turka kjøt í.

## Eystan

Byrjandi við eystri – tað er tá ið hann sleppur undan Fugloynni (*Norðberg*) og inn á Eiðvík – so er vindurin javnur á Viðareiði. Vindferðin er ikki meiri, enn hann er kring landið. Heldur ikki er eysturættin vátari á Viðareiði enn kring landið – heldur øvugt, um munur skal gerast.

Eystan er mjørkaætt á Viðareiði. Hann kann viðhvørt liggja tráur við avfalli ella mjørka.

Í lembingini í apríl og í mai kann hann hava tømt seg av eystri (*tømingur – hæsingur*) og liggja við kulda og ongum avfalli.



Mynd 3: Fugloy og Svínoy avmyndaðar úr Eiðsvík. Á eysturætt kemur hann undan Norðbergi á Fugloynni og inn í Eiðsvík. *Myndaánari Anja Mazuhn*

Í aðrar mátar er eystan ein eitt sindur óútroknilig ætt. Kann vera stak góð ætt viðhvørt um summarið – er tó ikki nøkur ynskiætt á Viðareiði.

## Landsynningur

Landsynningur fer ígjøgnum Fugloyarfjørð og kemur inn á Eiðsvík. Viðhvørt kann hann liggja so tráur av eystri við avfalli ella mjørka.

Landsynningur er ein jøvn ætt, ikki skaðaætt. Fólk í bygdini ræðast ikki landsynning. Vindferðin á landsynningi er tann sama, sum er søgd fyri landið.

Landsynningur er vátur á Viðareiði, tann ringasta regnættin í bygdini – *helst í øllum landinum*. Regnið eystaneftir er fult av fananskapi, segði viðingur, sum hevði fullan hjall av kjøti. Tað regnar altíð, tá ið landsynningurin byrjar. Liggur hon í fleiri dagar, er tømingur, líkasum á eystri. Tað regnar á sama hátt sum í øðrum støðum.

Landsynningur er mjørkaætt á Viðareiði. Men tá má vindurin vera lítil, helst minni en 5 m/s.

Eitt fyribrigdi um landsynning: Umleið 8 tímar áðrenn vind og nógv regni av landsynningi – meðan tað enn var fínasta veður – dunaði (*sang*) tað í el-tráðunum, sum gingu inn í galvin á einum húsi, ið standa mitt á eiðinum, eystan fyri Grømma.



Mynd 4: Bygdin og eiðið av Villingardalsfjalli ímóti landsynningi. Eiðið vendir í landsynning eystan og útnyrðing vestan. 4 av heil- og hálvættunum fara eftir eiðinum; 4 fara tvørtur um eiðið. Fjallið sunnan fyri bygdina er Malinsfjall (750 m).
*Myndaánari: Jóannes Sørensen*

Eisini verður sagt um landsynning, at hann er so óreinur, at sást tú, at tað garðaði á sjónum (*andøvsgul*) undir Skógum á hesari ættini, var ov nógvur vindur at fleyga í Settorvu.

## Sunnan

Sunnan er roknað sum besta ættin á Viðareiði. Malinsfjall stendur og verjir bygdina.

Vindurin er javnur á suðuri. Nakað skal til av vindi, fyrr enn tað yvirhøvur merkist í bygdini.

Ættin er turr og ikki tokuætt. Kann gott regna út av Svínoyarfirði og út av Hvannasundi (*Haraldsundi?*), meðan tað er turt á Viðareiði.

Sunnan er besta ættin í bygdini, bæði tá ið tað kemur til vind og til avfall. Ættirnar báðumegin við eru eisini turrar, tó er útsynningur sunnan turrari enn landsynningur sunnan. Útsynningur sunnan er ynskiættin í hoyna.



Mynd 5: Av Oyggjaskoratindi eystan fyri Villingardalsfjall og suðureftir. *Myndaánari Viktor Posnov*

Tá ið sólin kom í ættina, og tað ikki fór at regna, so bleiv ikki regn tann dagin – hetta er galdandi fyri ættirnar úr suðri til útsynning.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan er hørð hvirluætt, er størsta skaðaætt í ringum veðri á vetri. Var ikki soleiðis fyrr – er blivin tað síðan jólaódnina.

## Útsynningur

Útsynningur kemur til bygdina av Múlabygd um Leitið.

Vindurin á útsynningi er javnur, fer eystur ígjøgnum eiðið. Vanliga er minni vindur á ættini, enn sagt er fyri Føroyar. Kann vera næstan stilli, tá ið hann hevur sagt upp í 10 til 15 m/s.

Útsynningur er ikki ein vát ætt á Viðareiði. Tá ið tað er ælaveður, er útsynningurin morgunljótur – t.e. at tað er ælaveður á morgni. Keðiligt í hoyna.

Tá ið tað er púra klár luft á útsynningi, er ofta mjørki oman á Liðarnar og niðan í Kopp (*Inni í Vík*).

Eitt tekn uppá útsynning er, at mjørkin stendur í Vatnsdal á Fugloy. Tá er ofta gott veður á Viðareiði.



Mynd 6: Myndin tikin av Eggini í ein útsynning. *Myndaánari ókendur*

Yvirhøvur er útsynningur ein góð ætt á Viðareiði. Mesta sólin er av útsynningi og útsynningi vestri.

## Útsynningur vestan

Á útsynningi vestri liggur hann undan Múlanum.

Flógvin sær tað sama út í útsynningi vestri og á norði (*í øllum veðri*).

## Vestan

Vestan sleppur undan Múlanum og inn á Helluna. Tað sæst á sjónum, at vesturættin er, tá ið vindurin sleppur inn ímóti Múlabø og setir mjørkan í Malinsfjall.



Mynd 7: Á eiðinum ímóti vestri. *Myndaánari undirritaði*

Vindurin á vestri er javnur. Vindferðin er so at siga altíð nakað væl størri, enn sagt hevur verið fyri landið. Miðalvindurin kann viðhvørt næstan faldast við tvey.

Vestan er ikki roknað sum ein vát ætt. Heldur ikki mjørkaætt. Tær vátu ættinar eru eysturættirnar. Tað er vanliga klárari á vestri.

Vestan er tann ringasta ættin í bygdini, tá ið snýr seg um vind og brim á Helluni.

Eitt fyribrigdi um vesturættina: Nú setti hann í fjallið (*Malinsfjall*) – t.e. fjallið vekk í mjørka, úr hjallanum og niðaneftir. Keðiligt, tá ið vit skuldu á fjall.

## Útnyrðingur

Útnyrðingur er, tá ið hann sleppur heim við Líðini. Hann liggur javnur suður ígjøgnum Sundið.

Útnyrðingur er ein jøvn ætt. Ikki skaðaætt. Vindferðin er tann sama ella eitt sindur meiri, enn sum sagt er fyri landið.

Sama er galdandi fyri útnyrðing vestan. Hann er tann, sum gongur beinast eftir eiðinum.

Útnyrðingur ikki serliga vát ætt, og er ikki mjørkaætt. Grov æl eru vanlig á útnyrðingi.



Mynd 8: Villingardalsfjall (841 m) avmyndað av Válinum í útnyrðing. Líðin gongur í útnyrðing/landsynning. Er útnyrðingur, sleppur hann heim við Líðini. *Myndaánari xx xx*

Annars er útnyrðingur ein góð ætt – viðingar ræðast ikki ættina. Góð ætt at turka kjøt. Tá ið tað regnar á útnyrðingi, og krovini í hjallunum gerast vát, er tað ikki keðiligt fyri kjøtið, sum tað er á landsynningi.

## Útnyrðingur norðan

Tá ið hann liggur av útnyrðingi norði, kemur hann oman av rustini í Villingardalsfjalli.

Vindur er ójavnur, í ringum veðri harðar hvirlur. Uppi við Garð er ættin ringasta skaðaætt.

Útnyrðingur norðan er ikki ein vát ætt ella mjørkaætt.